## Sorgardagur í Moskva

Býráðið í Moskva hevur lýst dagin í dag sum almennan sorgardag, og nógvastaðni í býnum verða minningarhald til minnis um tey, sum doyðu í yvirgangsatsóknunum í býnum í gjár. 38 fólk doyðu, og meiri enn 70 vórðu særd, tá tvær sjálvmorðsbumbukvinnur sprongdu seg í luftina í undirgrundarbreytini. Eingin hevur átikið sær ábyrgdina av atsóknunum, men teir russisku myndugleikarnir halda, at tær báðar kvinnurnar høvdu tilknýti til norðara part av Kaukasus t.v.s. annaðhvørt Kekenia, Ingosetia ella Dagestan.



## USA hartaði Kanada

Í gjár var fundur í Kanada millum umboð fyri USA, Rusland, Noreg, Danmark og vertslandið um ymsar spurningar viðvíkjandi tí arktiska økinum, nú náttúruviðurskiftini har broytast so nógv. Men Hillary Clinton, sum umboðaði USA, var misnøgd við, at Kanada ikki hevði sent Finnlandi, Svøríki og Íslandi fundarboð, tí tey eru eisini limir í Arktiska Ráðnum. Tey trý londini hava eisini funnist at kanadisku fyriskiparunum. Kanada hevur svarað, at landið hevur boðið teimum londunum, sum hava øki upp at póløkinum.



*Hendir onki nú, kann kommunan seta tiltøk í fyri at avmarka ferðsluna í sambandi við Norðoyatunnilin, sigur Bjørn á Heygum, løgfrøðingur. Eisini Rannvá Ragnarsdóttir, løgfrøðingur, heldur, at kommunan hevur ikki skyldu til at halda vegin frá Norðoyatunlinum opnan*

# Annika Olsen kann fáa ein møguleika afturat

**Annika Olsen kann fáa ein síðsta møguleika at fáa vegin í sambandi við Norðoyatunnilin gjørdan. Tekur hon ikki av, kunnu tiltøk verða sett í verk fyri at avmarka ferðsluna. Tað er niðurstøðan í einum løgfrøðiligum uppriti um rættin hjá Eysturkommunu at stongja vegin til Norðoyatunnilin**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður vegurin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin, ikki gjørdur nú, eigur Býráðið í Eysturkommunu at umhugsa at seta tiltøk í verk.

Tað er niðurstøðan í einum uppriti, sum Bjørn á Heygum, løgfrøðingur hevur gjørt til býráðið í Eysturkommunu um tunnilsvegin.

Tað røkist onki fyri, at ein endalig loysn verður gjørt og tí hevur Eysturkommuna nú kravt, at ein loysn verður funnin, annars verður vegurin stongdur.

### Krevja eina skjóta loysn

Fyri at fáa greiði á sínum rættindum á økinum, hevur býráðið biðið Bjørn á Heygum um eina meting av støðuni.

Hann staðfestir, at býráðið eigur at umhugsa at geva Norðoyartunnlinum og myndugleikunum eitt síðsta skoðbrá, at gera nýggja vegin ígjøgnum Leirvík, serliga tá ið hugsað verður um tær víttgangandi avleiðingarnar og tað samfelagsliga óhaldbaru støðu, sum tað kann elva til at kvetta vegasambandi ímillum Norðoyggjar og restina av landinum.

- Undir øllum umstøðum eigur at verða sett fram krav um, at hesi viðurskifti fáast í rættlag skjótt og at ein greið tíðarætlan verður ásett fyri nær arbeiði kann byrja og verða liðugt, soleiðis at tað kann síggjast ein endi á hesum langa og drúgva máli.

Bjørn á Heygum sigur, at verður hetta ikki gjørt, og tað framhaldandi letur til, at landsmyndugleikarnir ikki taka málið í nóg stórum álvara, eiga møgulig tiltøk at vera umhugsað.

Men hann sigur, at hesi tiltøk eiga at verða avmarkað, har talan kann verða um avmarkaðan stongsul ella annað tílíkt.

- Ein fullkomin stongsul neyvan kann koma uppá tal tí so er mest sannlíkt at kravt verður, at vegurin verður latin upp aftur út frá einum samfelagsligum neyðrættarsjónarmiði.

### Ongin broyting

Hann staðfestir eisini, at rætturin hjá tunnilsvegnum at binda í kommunala vegin, varð givin sum eitt fyribils loyvi.

Hann staðfestir somuleiðis, at sum støðan er nú, eru ongi útlit fyri, at nøkur endalig loysn er í ljósmála hóast fleiri ár eru farin og hóast fýra ár eru liðin, síðani Løgtingið samtykti at gera vegin.

Tí er støðan ný onki øðrvísi enn tá ið fyribils loyvi var latið á sinni fyri fleiri árum síðani.

- Sostatt kann við vissu staðfestast, at fyritreyt hevur ikki heldur og at fyritreytin fyri loyvinum harvið kunnu sigast álvarsliga at hava svikið, sigur Bjørn á Heygum.

Tí heldur hann, a hendir onki nú, kann kommunan seta tiltøk í verk.

# Annika fær ikki peningin

Tað eydnaðist ikki at fáa orðið á Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í morgum.

Men hon hevur áður sagt, at hon skilir væl støðua hjá býráðnum í Eysturkommunu og at tey hava mist tolið.

Hinvegin hava tinglimir í samgonguni fleiri ferðir boðað frá, at tað kemur ikki upp á tal at lata eykajáttan til fleiri útbyggingar í ár, soleiðis sum fíggjarliga støðan er.

Og trupulleikin er júst tann, at Annika Olsen hevur ikki fingið nóg stóra játtan til at gera vegin ígjøgnum Leirvík fyri, sigur hon.

Tí er hon bundin á hond og fót, hevur hon fleiri ferðir sagt.

Og sum útsøgnirnar hava verið, fær hon heldur ikki peningin í ár.

Løgtingið hevur játtað 40 milliónir til endamálið, men vegurin og bátahylurin kosta 50 milliónir at gera og tí kann arbeiði ikki setast í verk, fyrrenn vissa fæst fyri, at peningurin røkkur

Í tí sambandi hava tey roynt at prutta pum prísin, men tað er so ikki komið á mál við tí.

Men nú skal fundur vera við býráðið eftir páskir og tá vónar hon at finna eina semju, sum allir partar eru nøgdir við og sum hon síðani ætlar at leggja fyri landsstýri við tí fyri eyga at fáa undirtøku fyri at seta hana í verk.

# Kommunan hevur ræðið á vegnum

Tað er kommunan, sum hevur ræðið og myndugleikan á kommunalum vegi.

Tað staðfestir Rannvá Ragnarsdóttir, løgfrøðingur í einum uppriti til býráðið í Eysturkommunu um vegin í sambandi við Norðoyatunnilin

Býráðið hevur eisini biðið hana um eitt uppriti um málið og hon sigur, at tað skulu tungtvigandi og sakligar grundgevingar til, fyri at stongja vegin til Norðoyatunnilin.

Eitt sakligt atlit kann vera, at kommunan á sinni hevur givið íbindignarloyvi undir skeivum fortreytum.

Í fyrsta lagi hevði kommunan orsøk til at halda at talan var um tíðaravmarkaða íbinding og loyvið var eisini tíðaravmarkað.

Tað er eisini eitt sakligt atlit, at fyri trygdina vil kommunan hava so fáar íbindingar í tann kommunala vegin sum til ber.

Tað kann eisini vera eitt sakligt atlit, at kommunali vegurin er ikki gjørdur til slíka ferðslu.

Hinvegin er vegurin lívæðrin hjá norðoyingum og tí skulu serstakliga góðar orsøkir til at stongja vegin.

Men talan er um kommunalan veg, sum onnur ikki kunnu binda í, uttan at fáa loyvi til tað.

Men hóast tað skulu góðar og sakligar orsøkir til at vegurin er opin, er tað niðurstøðan hjá løgfrøðinginum, at kommunan hevur ikki skyldu til at hava vegin opnan fyri ferðslu í sambandi við Norðoyatunnilin.

- Eysturkommuna hevur soleiðis møguleika til at steingja vegin, sigur Rannvá Ragnarsdóttir.